Løgtingsskrivstovan
Postboks 208
FO-110 Tórshavn
Att: Fíggjarnevndin

25. januar 2021

Yvirskipaðar viðmerkingar til uppskotini um broytingar í MVG- og skrásetingargjaldslógunum
Bilasølan og Waag taka fult undir við uppskotunum um at leingja og tillagað MVG- og skrásetingargjøldini fyri el- og vetnisbilar. Vit taka eisini fult undir við uppskotunum um avgjaldslættar til plugin hybrid bilar. Hesir bilar eru sera dýrir í dag, men teir eru eitt alternativ til reinar elbilar, meðan infrakervið við løðistøðum verður útbygt, tí plugin hybrid bilar kunnu koyra við streymi, beinleiðis frá elnetinum hjá SEV.

Vanligir hybrid bilar kunnu harafturímóti ikki løðast beinleiðis frá elnetinum hjá SEV. Vanligir hybrid bilar verða í dag ikki roknaðir sum serliga umhvørvis vinarligir bilar. Í dag er lítil og eingin munur á útlátinum frá einum vanligum hyrbrid bili, og teimum nýggjastu bilunum við vanligum diesel ella bensinmotorum. Vit halda tað tí vera eina misskiljing, at vanligir hybrid bilar vera roknaðir sum serliga umhvørvis vinarligir bilar í hesum uppskotunum, tí tað eru teir ikki.

Akstovan hevur í dag stórar trupulleikar við at avgjaldsrokna brúktar innfluttar bilar, og tí mugu helst onkrar broytingar gerast hesum viðvíkjandi. Um hetta er rætti mátan at gera , sum uppskotið leggur upp til, ivast vit stórliga í. Vit mæla til, at uppskotini um avgjøld á brúkt innflutt akfør og akfør, sum verða innflutt sum flytigóðs, verða viðgjørd betri, áðrenn lógaruppskot verður lagt fram hesum viðvíkjandi.

Hýruvognsvinnan hevur verið sera hart rakt av koronafarsóttini, og tí taka vit fult undir við, at hýruvognsvinnan, í hesum føri, fær ein lætta umvegis skrásetingargjaldslógini at koma ígjøgnum koronakreppuna. Vit síggja tí henda partin av uppskotinum sum ein hjálparpakka til hýruvognsvinnuna.

Tá ið tað kemur til leigubilar, so eigur lóggávan viðvíkjandi leigubilum at verða endurskoða og fáa eina gjølliga viðgerð, soleiðis at ein loysn fæst viðvíkjandi avgjøldum á leigubilar, sum vit kunnu liva við, nøkur ár fram í tíðina. Seinastu lógarbroytingarnar, hesum viðvíkjandi, vórðu gjørdur í skundi, beint fyri at Løgtingið fór í jólafrí. Tí er nú aftur neyðugt at pjøssa upp á reglurnar viðvíkjandi avgjøldum á leigubilar. Vit mæla tí til, at lógarreglurnar viðvíkjandi leigubilum verða endurskoðaðar og viðgjørdar gjølliga, áðrenn nakað uppskot verður lagt fyri Løgtingið hesum viðvíkjandi.

Vit fara at enda at biðja um ein fund við Fíggjarnevndina, har vit kunnu greiða nærri frá smálutunum og koma við onkrum dømum til okkara viðmerkingar.

Vinarliga

Hendrik Egholm
stjóri í Bilasølum

Pauli Waag
stjóri í Waag